# NØVN Í VIKUNI

Telefon 341800 - Fax 341801 - Fartelefon 216135
e-mail: maggi@sosialurin.fo

Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.

## Kurt Hansen 70 ár

Fríggjadagin verður ein kendur havnarmaður 70 ár. Kurt Hansen er dani, men hevur seinastu 35 árini búð í Føroyum.



Kurt er føddur í Jægerspris á Sælandi, men búði fleiri aðrastaðnis á Sælandi í sínum ungdómsárum. Eftir lokna skúlagongd gjørdist Kurt landbrugsmedhjælper á einum bóndagarði, men hann fór seinni í læru sum ekspedientur. Kurt bleiv útlærdur sum slíkur í handlinum hjá A. Nyholm í Ringsted, sum virkaði innan harraekvipering.

Í 1966 byrjaði Kurt at ferðast til Føroya sum handilsmaður, og á eini av sínum ferðum hagar hitti hann Kirsten, fødd Johannesen, úr Havn, sum seinni gjørdist kona hansara.

Um ársskiftið 1969/70 búsettist Kurt í Føroyum, samstundis sum hann fór í starv í Skálabúðini í Havn, har hann framvegis starvast. Árið eftir giftust hann og Kirsten, og á heysti 1971 fingu tey eldru dóttrina Ann. Á heysti 1972 kom so yngra dótturin Lis. Kirsten og Kurt eiga tvær ommu- og abbadøtur, ið eita Barba og Eyð.

Tey flestu kenna óivað Kurt frá Skálabúðini, men hann hevur eisini verið sera virkin innan badminton í Føroyum, og somuleiðis hevur hann verið ógvuliga virkin í Havnar Klubba, har hann hevur sitið sum formaður í drúgt tíðarskeið. Eisini hevur Kurt verið virkin innan Lions Club í Føroyum og Tórshavnar Ítróttarráð.

Kurt kennir sera nógv fólk í Føroyum, og tað hevði tí glett hann, um fólk fríggjadagin høvdu lagt leiðina framvið klubbanum millum klokkan tíggju og trý, tá ið hann hevur opið hús í felagshølunum hjá Havnar Klubba.

Í sambandi við stóra dagin hjá Kurt koma eisini nógv av nærmastu skyldfólkum hansara í Danmark á vitjan, og tey verða ikki færri enn 12 í tali.

## Jens Christian Guttesen 50 ár

Í dag, mikudagin 8. juni, verður Jens Christian Guttesen í Havn 50 ár. Jens Christian er havnarmaður, og hann hevur alla sína tíð fingist við sang og tónleik.



Foreldrini hjá Jens Christiani vóru Pavla og Jens Guttesen, sum bæði vóru ættaði úr Havnini. Jens Christian eigur tríggjar systrar, sum eru eldri enn hann: Jóna, Katrin og Gunrið. Jóna og Gunrið búgva í Havnini og Katrin býr á Eiði.

Tíðliga í tíðini fór Jens Christian til Danmarkar at nema sær kunnleika í cellospæli. Seinni var hann í Noregi, og nú hevur hann í fleiri enn tjúgu ár verið lærari í musikkskúlanum. Umframt at hava undirvíst í Havnini hevur hann ferðast eitt nú í Eysturoynna og til Klaksvíkar at undirvísa.

Síðani Føroya Symfoniorkestur varð sett á stovn, hevur Jens Christian verið tí hollur stuðul.

Jens Christian hevur frá tí hann var blaðungur sungið í sangkórinum í Ebenezer, har pápi hansara í mong ár var leiðari. Í fleiri enn tjúgu ár hevur Jens Christian havt ábyrgdina av kórinum. Hann hevur eisini í øll árini, síðani dupultkvartettin sá dagsins ljós, verið ein av stuðlunum har. Dupult kvartettin hevur við sínum framúr góða sangi verið til gleði og troyst og uppmuntran so nógva staðni.

Jens Christian giftist í 1983 við Kristinu, fødd Joensen og ættað úr Klaksvík. Tey búðu í Havnini, men longu í 1990 doyði Kristina av sjúku.

Í 1995 giftist Jens Christian við Maluni, fødd Gaard og ættað úr Havnini. Tey eiga trý børn – Annika fødd í 1995, Pavla fødd í 1998 og Jens, sum er føddur í 1999. Tey búgva í Grønulíð, har tað bæði inni og úti sæst væl til sera góðu handverkaraevnini hjá Jens Christiani.

# Tøkk 102 ár



Eg vil hervið takka øllum, sum komu at vitja meg á 102 ára føðingardegnum mínum 28.mai

Kærar heilsanir
Margrethe Egholm
Lágargarður

## Jytte Joensen 50 ár

Í dag, mikudagin 8. juni, verður Jytte Joensen í Hoyvík 50 ár. Hon hevur seinastu tjúgu árini arbeitt sum ljósmóðir á Landssjúkrahúsinum.



Foreldrini hjá Jytte eru Paula og Dánial Olsen, og tey búgva á Suðuroyarvegi, har Jytte er uppvaksin. Hon eigur tveir yngri beiggjar - Óli á Deild, sum er blaðstjóri á Vinnuvitan, og Magni, sum arbeiðir hjá Føroya Tele.

Eftir at Jytte hevði lokið studentsprógv í Hoydølum, fór hon til Danmarkar at lesa. Í fyrstu atløgu las hon franskt og týskt, men so saðlaði hon heilt um og fór at læra til ljósmóður. Hon leyk prógv á Ríkissjúkrahúsinum í 1982. Í tvey ár arbeiddi hon í Thisted, og í 1984 flutti familjan til Føroya.

Síðani tá hevur Jytte arbeitt á Landssjúkrahúsinum. Fyrstu árini hevði hon eisini viðtalu aðra staðni. Eitt nú var hon á Sandi. Eitt skifti fyri ikki so nógvum árum síðani sat hon í starvinum sum leiðandi ljósmóð-ir.

Jytte hevur listarligar gávur. Tað liggur sera væl fyri hjá henni at yrkja, og hon hevur til mangt høvi sett dám á við beinraknum og væl frambornum yrkingum. Ofta yrkir hon á donskum. Tað liggur eisini væl fyri hjá henni at mála, men tað er mest til húsbrúk.

Nógv tann mesta partin av frítíðini nýtir Jytte í Havnar Sjónleikarafelag. Longu í sjeyti árunum stóð hon á palli. Hon hevur umsett leikrit, og hon hevur eisini leikstjórnað. Tvey tey seinastu árini hevur hon verið formaður í Havnar Sjónleikarafelag, og hon situr framvegis í tí sessinum.

Jytte er gift við Jákupi Paula Joensen. Hann er ættaður úr Hósvík og arbeiðir sum leiðari á umhvørvisdeildini á Heilsufrøðiligu Starvstovuni. Tey eiga tvær døtrar – Teresa sum er fødd í 1986 og Karina, sum er fødd í 1990.

### Dagurin 8. juni

**Medardus,** deyður umleið ár 560. Biskupur í St. Quentin og Tourai í Fraklandi. Í Fraklandi er hann verndari hjá øllum teimum, sum hava víngarðar, og hjá øllum bryggjarum.

## Andlát & jarðarferðir

**Karin Strøm,** Trongisvágur, andaðist mánadagin á Suðuroyar Ellis- og Røktarheimi, 97 ára gomul. Jarðarferðin verður kunngjørd seinni.

**Jetta Kirke,** Kaldbak andaðist mánadagin á Landssjúkrahúsinum, 62 ára gomul. Farið verður úr Landssjúkrahúskapellinum hósdagin klokkan 16. Jarðarferðin verður úr Nazaret í Kaldbak fríggjadagin klokkan 14.

**Jóannes Andreassen** á Oyri andaðist á Landssjúkrahúsinm 6. juni, 80 ára gamal. Jarðarferðin verður kunngjørd seinni.

**Anna Elisabeth Jacobsen,** Tórshavn, vanliga nevnd Anna, andaðist mánadagin 6. juni, 81 ára gomul. Jarðarferðin verður kunngjørd seinni.

**Jarðarferðin** hjá Poulinu Jacobsen, á Varpinum, Klaksvík verður úr Christianskirkjuni í dag klokkan 13.30.

Góði babba, sonur og beiggi okkara

**Hallur Hammershaimb Jacobsen**

andaðist 2. juni 25 ára gamal.

Kistan fer frá Landssjúkrahúskapellinum hósdagin 9. juni kl. 18.00
Jarðarferðin verður úr Hósvíkar kirkju fríggjadagin 10. juni kl. 14.00

**Tóki, Torleif, Mai, Eirikur, Tórunn og Anna Maria v/familju**

Tey sum vilja minnast Hall við kransum ella blómum kunnu ístaðin lata eina peningagávu til sonin á konto nr. 1707665 í Føroya Banka.